## Órímilig krøv

Løgtingsins Umboðsmaður vil hava Búnaðargrunnin at umgugsa at broyta reglurnar um, at ein festari skal veita persónliga trygd fyri teimum lánum, sum hann tekur úr grunninum. Fyrr var tað nóg mikið, at festarin skrivaði undir vegna festið, men nú krevur grunnurin, at hann skal hefta persónliga. Tað helt Bóndafelagið vera órímiligt og vísti á, at kravið hjá grunninum stendur ikki mát við møguligar avleiðingar fyri festaran.

## Út við happing

Aftan á summarfrítíðina í ár verður happing ikki góðtikin í fólkaskúlanum. Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, hevur givið skúlaleiðarunum í landinum boð um at fremja tiltøk, sum skulu basa og fyribyrgja happing. Hann sigur, at skúlaleiðararnir skulu gera trivnaðarætlan og skipa toymi, sum skulu taka sær av trivnaði og happing. Í løtuni kannar Granskingardepilin, hvussu umfatandi happing er í fólkaskúlanum, og úrslitið kemur í vár.

# Fimmti ár við føroyskum útvarpi

**Í morgin eru liðin fimmti ár liðin síðani Útvarp Føroya byrjaði sendingar sínar**

**Hetta skal sjálvandi markerast, og tí verður allur dagurin merktur av hesi stórhending**

ÚTVARP
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Seinnapartin í morgin letur Kringvarpshúsið í Sortudíki upp dyrnar sínar fyri almennu móttøkuni í sambandi við stóra dagin.

Í eina tíð hava starvsfólk arbeitt við at fyrireika henda dagin, m.a. við eini áhugaverdari framsýning við útgerðini í útvarpinum. Henda framsýningin er eitt tað fyrsta fólk fáa eyga á, tá tey koma inn í forhøllina.

Framsýningin vísir nakað av teirri tøkniligu útgerðini, sum varð brúkt tey fyrstu árini í útvarpinum. Fer ein víðari kring um Kringvarpshúsið kunnu fólk skjótt gerast greið um, at her er hend ein øgilig menning bæði innan starvsfólk, senditíð, framleiðslur og tøkni.

Tað verður tó ikki bert í sjálvum útvarpinum at dagurin verður markeraður. Í sjónvarpinum fáa tey, ið ikki hava møguleika at verða til staðar til hátíðarhaldið møguleika at fylgja við.

Sjónvarpið fer nevniliga at senda rættiliga nógv úr Sortudíki, har dagurin verður hátíðarhildin.

Sent verður frá sendingum í útvarpinum hendan dagin, tíðindum, fyrireikingum til sendingar og øðrum. Her verða eisini vístar upptøkur frá savninum og garasjuni og frá móttøkuni, sum verður seinnapartin.

Fyrstu ferð sjónvarpið sendir er longu kl. 8.45, og seinasta vitjanin í útvarpinum endar klokkan 16.

Góðan føðingardag!




*Í fimmti ár hava føroyingar havt føroyskt útvarp. Tað skal markerast í morgin í Kringvarpshúsinum*

# Lív aftur í bygdarhúsið

**– Ætlanin er, at ungdómurin skal skipa fyri ymiskum undirhaldi, spølum og samveru av ymiskum slagi í bygdarhúsinum, verður sagt úr Vestmanna**

UNGDÓMUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Ungdómurin í Vestmanna fer nú undir aftur virksemið í bygdarhúsinum*

**Vestmanna:** Kommunan eigur bygdarhúsið í bygdini, og er ætlanin nú at brúka tað sum ungdómshús, skrivar heimasíðan hjá Vestmanna kommunu.

Fyri skjótt tveimum árum síðani heittu nøkur foreldur í Vestmanna á kommununa at útvega ungdóminum í bygdini høli til ymiskt virksemi í frítíðini. Um sama mundið kom spurningurin fram um keypið av bygdarhúsinum.

Hetta tók sína tíð at fáa avgreitt, men nú er hetta klárt, og er ætlanin at tað nú skal verða møguligt hjá ungdóminum at hugna sær saman her, at arbeiða við teldum, at hyggja eftir sjónvarpi á stórskíggja og líknandi sum teimum ungu dáma væl.

### Ungu skipa fyri

Tá bygningurin einaferð er klárur at taka í nýtslu, er ætlanin at hava opið gerandiskvøld.

Møguligt skal eisini vera hjá ungdómunum at venja tónleik í húsunum og at kunna skipa fyri smærri smærri konsertum, framsýningum og øðrum.

Herfyri vórðu tvær nevndir valdar til bygdarhúsið - ein fyri tey ungu og ein fyri foreldrini. Nevndirnar skulu saman við mentunarnevndini hjá kommununi gera ein leist, eftir hvørjum virksemið í húsinum skal skipast.

– Tað verða tó tey ungu sjálvi, sum koma at standa fyri dagliga virkseminum í húsinum, verður sagt úr Vestmanna.

# Totalt roykiforboð í august



*Eingin royking í býnum frá 1. august*

**Býráðið í Fuglafirði hevur samtykt, at tá skúlar og dagstovnar lata upp eftir summarfrítíðina, verður ikki loyvt at roykja á hesum stovnum**

ROYKING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Fuglafjørður:** Sosiala nevndin hevur arbeitt við spurningum um roykipolitikkin í kommununi í eina tíð.

Í fyrstu syftu var hugsað um at seta forboð fyri royking á stovnum, har børn vóru - tað er: í skúlum, frítíðarskúlanum, dagstovnum og í dagrøktini.

Nevndin sendi m.a. út hoyringsskriv til stovnarnar. Út frá hesum varð avtalað fram ímóti einum roykfríum skúla og barnaansingarstovnum frá 1. august í ár.

Sosiala nevndin legði fram álit í málinum á seinasta býráðsfundi í Fuglafirði. Og tað tók býráðið somuleiðis undir við.

Eftir summarfrítíðina verður tískil ikki loyvt at roykja á nøkrum av teimum kommunalu stovnunum í Fuglafjarðar kommunu.